# Eiðis skúli

## Søkt verður eftir lærarum til Eiðis skúla skúlaárið 2003/2004

- 1 starv 26,5 tímar fyri lærara í farloyvi
- 1 starv 26,5 tímar vegna lækkað tímatal v.m.

Lærarar, sum kunnu undirvísa í ítrótti, alisfrøði og smíð hava fyrimun.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004 og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum á tel. 42 35 79 ella 22 90 45.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi leygardagin 17. mai 2003.

**Skúlastýrið**
/Annika Egholm
470 Eiði

Eiðis skúli hevur undirvísing í 1.-7. árgangi. Skúlin er fyri kortum bygdur út við serstovum, lærarahølum og ítróttarhøll, og hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Skúlin hevur sett sær sum mál, at næmingar og starvsfólk trívast í skúlanum og at vit skapa heild og samanhang í skúlagongdina hjá barninum. Komandi skúlaár verða 8 lærarar og 83 næmingar í Eiðis skúla.

# Avloysari

**fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi.**

Søkt verður eftir avlosara at arbeiða hálva tíð frá 1. august 2003 og fyribils til 1. februar 2004.

**Starvið umfatar**
Alt vanligt skrivstovuarbeiði í samband við skúlan.

**Førleikakrøv**
Fólk við skrivstovuútbúgving hava fyrimun. Í starvinum hevur tú samband við nógv fólk, bæði innanhýsis og uttanhýsis, og mást tú tí vera opin og virkin.

**Setanartreytir**
Sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreist**
Umsóknin skal vera Handilsskúlanum á Kambsdali í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. juni 2003. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til deildarstjóran á tlf. 444 900.

**Føroya Handilsskúli**
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður
Tlf. 444 500 · Fax 444 901
Teldupostadr. fh@kambsdal.olivant.fo

# Frá Runmavíkar Skúlastýri

**Lýsing eftir lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2003/2004.**

**Talan er um**
- 5 størv á 26,5 lønartíma fyri lærarar í farloyvi
- 1 starv á 26,5 lønartímar vegna lækka tímatal og avlopstímar.

Serliga er brúk fyri lærarum, sum kunnu undirvísa í handverk og list, ítrótti, teld, alis/evnafrøði og serligan tørv.

Størvnini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1. og 27.4.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at ringja 447331 ella 217331.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 23. mai.

**Runavíkar Skúlastýri**
v/ Malan Rasmussen
Bakkavegur
FO-645 Søldarfjørður

# Brúktur Ford Focus 1,8 Diesel

Sær út sum nýggjur




**Ford Focus 1,8 Diesel**
Árg. 2000 Km. 66.000 Kr. 178.000,-
útgjald bert 71.500,- rest at fíggja yvir 3 ár við 6 %
Alu felgur, píkadekk við felgum og sleipikrók.

**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Tórshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

# Bókhald

Til eitt virki í Tórshavn verður søkt eftir einum fólki til bókhaldið. Í bókhaldinum starvast frammanundan tvey fólk.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði, og tann, ið setast skal í starvið, má hava kunnleika til bókhald. Praktiskar royndir eru tí ein fyrimunur.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe (Joen Magnus Lamhauge).

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. mai 2003.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 351700
Fax (+298) 351701
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo

# Leirvíkar skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv.

- 1 starv 26,5 tímar fyri lærara í farloyvi
- 1 starv umleið 20 tímar vegna eftirútbúgving v.m.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004 og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meira fæst at vita um størvini á telf. 264164, 443164 ella 443234.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 20. mai 2003.

**Skúlastýrið**
v/ Jákup Tróndheim
520 Leirvík

# Sveisiarbeiði

Eg havi byrjað mína egnu fyritøku har alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og alminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði.

**Hevur hetta tín áhuga ring nátt sum dag.**
**Tlf. 422127/220957**
**LB Service**
v/ Lars Bisgaard

# Eysturoyingar - koyrikort

Nýtt skeið til lastbil og buss byrjar 6. mai í Eysturoynni.

**KL / Runavíkar Koyriskúli**
Tlf. 777777 og 282222

# Vestmanna Skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2003/2004 fyri lærara í farloyvi, lækkað tímatal o.a.; 3 fulltíðarstørv og 1 parttíðarstarv.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 424360, ella frá Jógvan í Dávastovu, formann í skúlastýrinum, tlf. 424566.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 20. mai 2003.

**Vestmanna Skúlastýri**
v/ Jógvan í Dávastovu
350 Vestmanna



# Royn okkara Thai-buffet



## Frá 1. mai

## Allar gerandisdagar kl. 12 - 14

**Rafik'sa Pizza og Shawarma**
Tórsgøta 11 • Tel. 35 96 96

# LEIGA SJÓNVARP!

Vit leiga út sjónvørp í støddum frá 20 til 28", video og upptøkutól.
**Einki depositum!**




**Radioverkstaðið**
v/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1 • Hoyvík • 31 95 44 • 25 11 60

NDA - Northern Diving Adventure

# GRUNDSKEIÐ

- Open Water Diving
  *19. - 25. mai ella 16. - 22. mai*

# VÍÐKAÐ SKEIÐ

- Advanced Open Water
- Medical First Aid
- Rescue Diver
- Dive Master

*- hesi skeið kunnu avtalast, ring og hoyr nærri !*

**PADI - felagsskapurin**
**Tel 50 87 83**
**www.padi.com**

# Skrivstovufólk

**Starvið**
Søkt verður eftir skrivstovufólki at seta 1. juni 2003.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur:
- Skrivstovuútbúgving
- Góðan teldukunnleika
- Kunnleika til bókhald
- Góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Upplýsingar**
Fyrispurningar um starvið kunnu setast Svannu Justinussen.

**Umsókn**
Umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til:

**Matrikulstovan**
Postboks 327
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Matrikulstovuni í hendi í seinasta lagi 19. mai 2003.

*Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Arbeiðsøkini á stovninum eru viðlíkahald av matriklinum, marknasetingar, útskiftingar, uppmálingar og kortlegging. Á stovninum starvast 18 fólk.*

# Hús ynskist til leigu

J & K Petersen ynskir sethús í Tórshavn ella nærhendis til leigu frá 1. juni.

tlf. 315060/217532
e-mail: jkp@jkp.fo

# Bilur til sølu

Mazda B2500, 4x4 diesel, pickup, árg. 12/1998, koyrt 22.000 km., hevur el-rútar, el-spegl, sentrallás, alufelgur og nýlakeraður til sølu.

**Tlf. 424232/214232**